

# Byggifrøðingur til teknisku deild

Tórshavnar kommuna stendur í løtuni fyri nógvum áhugaverdum verkætlanum og anleggsarbeiðum, og tískil søkja vit eftir einum nýggjum starvsfelaga, ið saman við starvsfeløgum og ráðgevandi vinnuni hevur hug og dirvi at føra hesar spennandi uppgávur út í verki.

**Arbeiðsuppgávurnar**
eru m.a. at gera uppskot og kostnaðarmetingar í sambandi við vegarbeiði umframt at standa fyri projektering, útbjóðing, eftirlit og byggirokniskapi, sum kommunan stendur fyri.

**Vit ynskja**
at tú hevur útbúgving sum byggifrøðingur ella líknandi og hevur góðar arbeiðsroyndir og royndir innan almenna fyrisiting, ið samanlagt geva neyðugan førleika at røkja starvið. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til telduforritini, ið hoyra til Microstation, Microsoft Officepakkan og Navision Attain. Neyðugt er, at tú hevur koyrikort.

**Persónligir eginleikar**
Vit ynskja, at tú ert røkin, gongur undan í at menna tænastustøðið og dugir væl at fara við starvsfeløgum og viðskiftafólki. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt, kunna taka avgerðir og duga væl at málbera teg í skrift og talu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsóknir**
saman við viðmælum, avrit prógvum o.t. og upplýsing um royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 29. september 2006. Viðmerkið umsóknina „Byggifrøðingur til teknisku deild".

Tekniska deild hevur 12 starvsfólk í arbeiði og heldur til í posthúsbygninginum saman við byggi- og býarskipanardeildini. Arbeiðsøkið hjá teknisku fyrisitingini er mangt annað at viðgera byggimál, útstykkingarloyvi umframt at standa fyri planlegging, projektering og viðlíkahald av øllum kommunalu vegunum og tekniskum veitingum, ið kommunan hevur ábyrg av. Harumframt hevur tekniska deild sum høvuðsuppgávu umsiting av heilsu- og umhvørvismálum.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

# Dansiskeið



***Nú kvøldini gerast longri, verður aftur farið at svinga...***
***...um nóg nógv tekna seg, skipar Dansifrøi fyri dansiskeiði í aulini í studentaskúlanum í Hoydølum.***

***Bólkarnir verða hesir:***

***Týskvøld:***
*Bólkur1:* 19.00 til 20.00 Argentinskur dansur
*Dansileiðarar:* Anne Lise & Mads A. Winther
*Tilmelding á tlf.:* 31 53 10

*Bólkur2:* 20.30 til 21.30 fólkad. / dansispøl
Blanda hold við livandi tónleiki
(Kristian Blak, Hilmar Joensen og aðrir gestatónleikarir)
*Dansileiðari:* Sharon Weiss
*Tilmelding á tlf.:* 31 48 15 / 22 86 53 ella til sharon_weiss@skulin.fo

***Hóskvøld***
Fólkadansur & Dansispøl
*Bólkur3:* 19.00 til 20.00 Byrjarar
*Bólkur4:* 20.00 til 21.00 Tey ið hava dansa 2 ár ella meira
*Bólkur5:* 21.00 til 22.00 Tey ið hava dansað í fleiri ár
*Dansileiðarar:* Ruth og Jógvan Martin Mørk
*Tilmelding á tlf.:* 31 61 25 ella til jm0810@skulin.fo

***Kostnaður fyri dansiskeiðið 2006/2006 er kr. 500,00 + limagjald***

**Dansiskeiðið byrjar týskvøldið 19. september 2006 til 15. mars 2007. Áhugaði verða biðin um at tekna seg sum skjótast. Gjaldast skal við fyrsta frálærutíma.**

Eins og undafarnu ár skipar Dansifrøi fyri dansifrálæru í gomlum sum nýggjum dansum. Tað liggur nær at hugsa sær, at tað at dansa gamlar dansir er gamaldags. Men soleiðis munnu tey yvir 1500 fólkini, sum í eitt styttri ella longri tíðarskeið hava verið limir í dansifrøi, neyvan hava hugsað.

At dansa er stuttligt, at dansa er eisini ein góður máti at koma burtur frá tí daglig arbeiðsresinum...
Dansifrøði er eisini annað enn dansur! Tann sosiala samveran er eisini ein týðandi partur av felagsskapinum.

**Dansifrøi**



# SPEKT søkir KT ráðgeva

SPEKT veitir ráðgeving og grannskoðan til allar greinar innan handil, ídnað, fígging og almenna fyrisiting. Ein av stóru avbjóðingunum hjá kundum okkara er:

*Hvussu kann nýtslan av KT skipast best møguligt fyri at náa settu handilsligu málini, samstundis sum tryggjað verður móti teimum vansum, sum eru knýttir at nýtsluni av KT*

SPEKT søkir tí eftir einum KT ráðgeva, sum skal veita ráðgeving og grannskoðan innan KT økið og harvið hjálpa kundunum við at betra virkismannagongdirnar uttan at tað gongur út yvir trygdina.

**Arbeiðið**
Arbeiðið fevnir fyrst og fremst um at:

- Ráðgeva í sambandi við skipan av KT økinum
- Veita ráðgeving um stýring av vansum, sum eru knýttir at KT nýtsluni
- Greina og eyðmerkja veikleikar í KT trygdini
- Meta um og eftirkanna verandi eftirlitsskipanir
- Ráðgeva í sambandi við skipan og verkseting av nøktandi eftirliti

Arbeiðið verður framt í tøttum samstarvi við kundan. Vit hava eina samstarvsavtalu við KPMG í Danmark, sum ger tað møguligt at fáa ráðgeving frá IT Risk Management deildini hjá teimum, um tørvur er á tí.

**Umsøkjarin**
Vit ímynda okkum, at tann, ið søkir starvið:

- hevur royndir og/ella ástøðiliga útbúgving innan KT-økið
- er fryntligur og fyrikomandi
- er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð
- er áhugaður í at halda áfram við at menna seg innan KT-økið við at luttaka á viðkomandi skeiðum hjá millum annað KPMG

Lønin verður ásett eftir útbúgving og royndum.

**Umsóknin**
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum í seinasta lagi 30. september 2006.

Meira fæst at vita við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 34 ella 22 28 52.

TEAM85

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17 · Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15 · Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

SPEKT statsaut. revisorar